# Neistin á veg til Serbia

**HONDBÓLTUR** Triðja árið á rað er Neistin farin av landinum at spæla europeiskar dystir um vikuskiftið. Eins og í fjør, gongur leiðin hesa ferð til Serbia, har Neista-venjarin, Ingi Olsen, væntar at fáa sera sterka mótstøðu

Hilmar Jan Hansen

Síðani fríggjadagin hevur besta manslið hjá Neistanum verið niðri á venjingarlegu, sum fyrst og fremst er fyrireiking til EHF Cup-dystirnar um vikuskiftið ímóti serbiska stórfelagnum, RK Metaloplastika Zorka. Neistin spælir fyrra dystin fríggjakvøldið klokkan 19.30 og seinna dystin sunnumorgunin klokkan 10.

– Meðan vit hava verið í Danmark, hava vit fingið vant hvønn dag og eisini spælt nakrar dystir ímóti liðum, sum eru sterkari enn vit. Vit vita jú, at serbiska mótstøðan verður bæði størri og sterkari enn vit, sigur Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, hvør ferðalag fer úr Danmark til Serbia í morgin.

– Vit hava sæð upptøkur av Mataloplastika, sum vísa okkum eitt lið, ið bæði telur spælarar, sum eru yvir tveir metrar høgir, og spælarar, sum viga yvir 100 kilo. Teir spæla kanska nokk so seinan hondbólt, men tað verður øgiliga tungt at koyra ímóti teimum.

Spælararnir hjá Neistanum fyrireika seg bæði til EHF Cup-dystirnar í Serbia, umframt at teir gera seg klárar til eitt kappingarár, har teir skulu verja meistaraheitini í bæði lands- og steypakappingini. Teir hava vant saman allan august mánað, og undan tí hevur styrkivenjing verið á skránni hjá teimum hvør sær.

– Hugsa vit um, hvør tíðin er á árinum, er tað á einari leið hjá okkum, men av tí at tað er trupult hjá okkum at fáa dystarvenjing í Føroyum hesa tíðina, kemur væl við, at vit hava fingið spælt ímóti nøkrum liðum niðri hesar dagarnar, sigur Ingi Olsen.

– Serbiskur hondbóltur er so góður, at skulu vit gera nakað við teir, mugu allir hjá okkum spæla upp til sítt allarbesta í senn. Í fjør vóru vit eisini í Serbia og spældu, so vit vita, at óansæð hvussu mótstøðuliðini í hesum kappingunum eita, so er talan um stórar og sterkar spælarar, ið kortini hava skjótleikan.




*– Serbiska mótstøðulið okkara telur spælarar, sum eru yvir tveir metrar høgir, og spælarar, sum viga yvir 100 kilo, so tað verður øgiliga tungt at koyra ímóti teimum, sigur venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

### Triðja árið á rað

Hetta er triðja árið á rað, at manslíðið hjá Neistanum roynir seg í europeisku kappingunum. Í fyrraárið var Neistin við í kappingini fyri meistaralið og spældi ímóti HC Lovcen úr Montenegro, og í fjør var Neistin í kappingini fyri steypavinnarar, tá mótstøðuliðið var HC Kolubara úr Serbia.

Hesa ferð, eins og í fjør, verða báðir teir europeisku dystirnir hjá Neistanum spældir á útivølli, og tað er fyrst og fremst av fíggjarligum áðum. Men í fyrraárið var talan fyrst um útidyst og síðani heimadyst, sum varð spældur í ítróttarhøllini á Hálsi, tá Neistin framdi tað bragd at vinna 33-32 á montenegrinska mótstøðuliðnum.

– Ítróttarliga er eingin ivi um, at tað hevði verið ein fyrimunur hjá okkum, um vit kundu spælt í øllum førum annan dystin heima í Føroyum. Stuðulin frá okkara áskoðarum hevði hjálpt væl til, umframt at lið frá Balkan hava tað fyri, at tey gjarna spæla munandi verri úti enn heima, sigur Ingi Olsen.

– Niðri í Serbia er tað soleiðis, at har er mestsum alt loyvt, so áskoðararnir buldra og gera øgiliga nógv um seg. Eitt øgiligt trýst verður lagt á dómararnar, sum tí kunnu hava ilt við at standa ímóti – uttan at tað kortini skal vera nøkur umbering. Men tað kann vera sera torført at fáa líkinda úrslit undir slíkum umstøðum.

Óansæð úrslitið av teimum báðum dystunum niðri í Serbia um vikuskiftið, heldur Neista-venjarin tað vera ein góðan fyrimun undan einum longum vetri við bæði lands- og steypakapping, at lið hansara fær fleiri venjingardystir, áðrenn kappingin heima í Føroyum fer í gongd. Serliga heldur hann tað koma væl við, at hetta alt eru dystir ímóti sterkari liðum.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Seinasti HM-finalisturin frá 1930 er deyður

**FÓTBÓLTUR** Fyrrverandi argentinski fótbóltsspælarin, Francisco Varallo gjørdist 100 ára gamal

Heri Simonsen

Francisco Antonio Varallo, sum var føddur í La Plata í Argentina tann 5. februar í 1910, spældi við tí argentinska fótbóltslandsliðnum, árini 1930 til 1937, og spældi hann við í tí fyrstu HM-finaluni í søguni, sum var millum Uruguay og Argentina. Finalan var spæld á Centenario leikvøllinum í tí uruguanska høvuðsstaðnum, Montevideo tann 30. juli í 1930. Uruguay vann finaluna 4-2, eftir, at Argentina hevði verið á odda 2-1 í steðginum.

Francisco Varallo var tann seinasti, sum var á lívi av teimum, sum spældu við í tí fyrstu HM-finaluni í 1930. Varallo – sum var tað teir nevndu centre-forward á tí gamla fótbóltsmálinum – skoraði eitt mál í HM-endaspælinum, og var tað í bólkaspælinum, tá Argentina vann heili 6-3 á Meksiko.

Varallo, sum hevði kelinavnið »Pancho« spældi 16 landsdystir fyri Argentina, har hann skoraði sjey mál. Í 1937 vann hann suðuramerikanska meistaraheitið – Copa America – við argentinska landsliðnum.




*Fyrrverandi argentinski landsliðsleikarin, Francisco Antonio Varallo, leikti við í fyrstu HM-finaluni í 1930*

Francisco Varallo var yrkisspælari við tí kenda liðnum, Boca Juniors, har Diego Maradona er tann størsta legendan í søguni. Árini 1931-1940 spældi Francisco Varallo 210 dystir fyri Boca Juniors, har hann skoraði heili 181 mál. Hann gjørdist argentinskur meistari við Boca Juniors tríggjar ferðir. Hetta var í 1931, 1934 og í 1935.

Tá Varallo fylti 100 ár tann 5. februar í ár, var nógv gjørt burturúr í Argentina, og var hann rættiliga væl fyri tá, og skemtingarsamur segði hann við argentinsku pressuna, at hann ætlaði at gera eitt »comeback« í ár.